## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ALMENT OYÐSL OG ÁBYRGDARLOYSI

At tað almenna gongur undan í oyðsli eru so mong dømi um. Í blaðnum mánadagin kundu vit vísa á, at Nærverkið rindar 40.000 krónur í leigu fyri eini hús, sum als ikki verða brúkt. Tað ringasta av øllum er, at leigusáttmálin ikki kann sigast upp fyrr enn um hálvtannað ár. Tað vil aftur siga, at Nærverkið rindar út við eina millión krónur í leigu fyri eini hús, sum Nærverkið als ikki brúkar og ikki hevur brúkt í mánaðir.

Tað skal máti vera við oyðsli. Tað verður áhugavert at síggja, hvør hevur ábyrgdina av, at skattgjaldarans peningur verður viðfarin á hendan hátt. Og hetta er neyvan heldur eindømi, tí í veruleikanum er her bara talan um ein tilvildarligan leigusáttmála av mongum, sum Sosialurin hevur tikið úr rúgvuni.

Vit hava sæð tað fyrr, at Nærverkið hevur leigað fyri okursprísir. Her fyri flutti Nærverkið úr bygninginum í Bókbindaragøtu í Havn, sum hevði landsins hægsta leigupris. Men hvat hendi? Jú Fiskimálaráðið flutti inn. Hvør skal siga klárar eitt aðalráð ikki at oyðsla nóg nógv, so kann eitt annað aðalráð taka yvir.

Tað marghátttliga í øllum hesum er spurningurin, hví tað almenn ikki kann byggja sær egnaðar umsitingarbygningar. Tað hevði verið so upplagt, at ein bygningur varð bygdur, sum kundi hýst øllum aðalráðunum, uttan teimum, sum skulu húsast í Tinganesi. Ein slíkur bygningur kundi eisini hýst mongum stovnum undir aðalráðunum.

Sjálvandi kostar ein slíkur bygningur ella bygningar nógvar pengar, men tað man muna lítið í mun til alla ta leigu, sum tað almenna rindar ymsataðni í landinum, serliga í høvuðsstaðnum.

Men trupulleikin er kanska tann, at politiskur vilji ikki er at grundfesta almennar stovnar í Havn. Teir skulu miðspjaðast. Og somu politikarar, sum tosa so nógv um sparingar og um at effektivisera



almennu umsitingina teir tosa við fleiri tungum, tí samstundis vilja teir spaða alskyns stovnar kring landið sum bygdamenning.

Tað hevði verið áhugavert at sæð eitt yvirlit yvir samlaðu leiguútreiðslunar hjá tí almenna og samstundis sæð, hvussu ábyrgdin er plaserað, og hvussu avgerðir verða tiknar, sum føra við sær at eitt hús kann standa tómt í eini tvey ár, meðan vit skattaborgarar gjalda eina millión í húsaleigu til púra onga nyttu.

Hvat privata vinnan ger tað má hon um. Men tá ábyrgdarfólk í alemnnu umsitingini bera seg soleiðis at, so eigur tað at fáa avleiðingar fyri onkran, so tað ikki kann endurtakast.

**Hvør hevur ábyrgd av slíkum oyðsli?**



# Mission: Impossible

*– Havnarfólk eru býtt og órein við klaksvíkingar!*
*– Klaksvíkar Sjúkrahús hótt eftir lívinum*
*– Klaksvíkar Sjúkrahús livir upp til krøvini*
*– Sjónvarpið ber ósannindi*
*– Nú er nokk!*
*– Frustratiónsherðini javnaðarmanna*
*– Eitt trygt og vælvirkandi sjúkrahúsverk*
*– Klaksvíkar Sjúkrahús fyri órætti í miðlunum*
*– Landsstýrismaðurin í heilsumálum má taka seg saman*
*– Detta nú 10 milliónir niður í Klaksvík*
*– Trygd og dygd*

Hetta vórðu nakrar av yvirskriftunum í Norðlýsinum, sum Klaksvíkar Kommuna sendi í hvørt hús í landinum fríggjadagin. Tað er ikki hissini átak, sum Føroya næststørsta kommuna er farin undir. Ein herferð við lokalblaðnum, sum fyri pengar hjá skattaborgarum í Klaksvík verður sent í hvørt hús í landinum fyri at vinna ljóð fyri sjónarmiðum hjá ávísum politikarum, sum bara ynskja ávísar spurningar og ávís svar og at ávísir spurningar ikki verða svaraðir, um svarið ikki er hóskandi.

Vit bíða við spenningi, til Heðin Mortensen fer at royna at keypa Sosialin ella Dimmalætting til sama endamál.

Samstundis um hetta brandingartiltak hjá Klaksvíkar kommunu er láturligt, so er tað eisini grátuligt. At so nógv fólk við ábyrgd í Klaksvík í senn skulu vera so frustrerað og hava so nógvar konspiratiónsteoriir um, hvussu órein havnarfólk eru, og hvussu býtt øll tilmæli, sum verða skrivað í Havn eru, tað er veruliga bekymrandi.

Vit kenna støðið hjá Norðlýsinum. Vit yppa øksl og hugsa ikki meira um tað, tí tað, sum har stendur, umboðar ikki miðal intelligensin hjá norðoyingum. Men tað umboðar eftir øllum at døma støðið hjá ovastu leiðsluni í Klaksvíkar býráð, og tað er beinleiðis depirmerandi.

Missiónin er veruliga impossible...



**Sjúklingurin í fokus**

AKSEL V. JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 27



**Fýra falnir undir verandi eftirliti**

UNI ARGE
KJAK Á SÍÐU 29

# Nú nærkast valið av álvara

At Fólkaflokkurin av sínum eintingum hevur gjørt av at minka talið av landsstýrismonnum merkir, at nývalið nærkast av álvara.

Sosialurin veit, at Fólkaflokkurin hevur ikki tosað við sínar samgongufelagar um hesa ætlan, áðrenn avgerðin varð tikin. Tí er uttan iva talan um spinn frá Fólkafloksins síðu.

Fjølmiðlarnir vórðu kunnaðir áðrenn samgonguflokkarnir, og meðan blaðmaður okkara tosaði við Jóannes Eidesgaard, kom tíðindaskriv frá løgmanni um, at hann hevði loyst Jørgen Niclasen úr starvi og sett Jacob Vestergaard sum landsstýrismann í uttanríkisráðnum eisini.

Uttan iva skal Fólkaflokkurin brúka hetta til at vísa, at flokkurin ynskir sparingar í landsumsitingini. Men við hesum er sparingin ógvuliga minimal - og fyri árið í ár er talan um eina eykaútreiðslu fyri landskassan.

Anfinn Kallsberg leggur frá sær í politikki. Hann hevur verið valdur tingmaður í góð 30 ár, hann varð fyrstu ferð valdur á ting 8. november í 1980 og er valdur hvørja ferð síðani, Hann hevur verið landsstýrismaður og løgmaður í tilsamans 10 ár. Tað merkir, at hann hevur rætt til fulla løgmanspensjón frá tí at hann er 60 ár. Hann er 63 ár. Tað merkir, at hann fær umleið 30.000 krónur í pensjón so leingi hann livir.

Ein landsstýrismaður fær í løn og ágóðum slakar 50.000 krónur. Tað merkir, at sparingin við at koyra ein landsstýrismann út og koyra Anfinn Kalssberg upp á pensjón er einar 20.000 krónur.

Men bæði Anfinn Kallsberg og Jørgen Niclasen skulu hava ávikavist løgtings- og landsstýrismannaløn í seks mánaðir, so tað merkir, at landskassin fær eina eykaútreiðslu av hesum í ár.

Tá ein samgongufloklur ger slíkt í óðum verki – uttan at kunna samgongufelagarnar áðrenn, so merkir tað, at stevið í samgonguni er ringt, at flokkurin skal profilera seg – og at nýval er í væntu.

Sosialurin Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo